## Nógvur laksur

Sum vant eru nógvir stuttleikafiskimenn á ferð kring alt Ísland í summar, og tað hevur eisini ligið væl fyri við tráðuni summastaðni. Eitt nú hevur rættiliga nógvur laksur verið í fleiri áum, og í Norðurá á Norðurlandinum er veiðan farin at toga í einar 100 laksar um dagin, skriva bløðini. Tað merkir kortini ikki, at menn fáa laksarnar við sær til hús, tí eftir reglunum verður ein stórur partur av laksinum sleptur útaftur, skrivar Morgunblaðið.



*Tað er nógvur laksur í Norðurá (Mynd: Vísir)*



*Nógv fólk vóru samankomin til hugnaligu løtuna*

# Sleppa í nýggja barnagarðin komandi summar

**Hósdagin setti borgarstjórin í Leirvík, Fríðgerð Heinesen, spakan í fyri nýggja barnagarðinum við Brúsá. Nógv fólk, bæði úr Gøtu og Leirvík, vóru komin saman til hesa løtuna**

Á hugnaligu løtuni vísti formaðurin í trivnaðarnevndini, Ólavur Sjúrðaberg á teir møguleikar sum nýggi stovnurin fer at hava.

Hann vísti á góða útsýnið yvir fjørðin, út yvir bygdina í ein norðan og móti eystur. Barnagarðurin kemur haraftrat at liggja í einum náttúruvøkrum øki, tætt við á, viðarlundina og fótbóltsvøllin og hagan.

Á samkomuni sungu børnini ein sang og síðani var farið inn í bygdarhúsið, har øll fingu ein góðan bita sum starvsfólk í barnagarðinum høvdu skipað fyri. Samstundis við hetta var høvið hjá fólki at síggja tekningar av nýggja barnagarðinum.

P/f Fjarðahús skulu byggja barnagarðin, sum er ætlaður til 84 vøggustovu- og barnagarðsbørn. JHR Entreprenørum fara nú at grava út fyri barnagarðinum.

Hesi bæði arbeiðini kosta tilsamans 13,4 mió. krónur.

Barnagarðurin verður eftir ætlan klárur at taka í nýtslu komandi summar.

**sb.**



*Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri, loysir fyrsta flagið í barnagarðinum*

## Nýggj føroysk fyritøka ger telduspøl

Íverksetarahúsið í Klaksvík hýsur í hesum døgum eini nýggjari fyritøku. Talan er um Ageware, sum Theodor Sólbjørg eigur og rekur.



*Theodor Solbjørg brýtur upp úr nýggjum við einum hugskoti um at gera telduspøl*

Mynd: is.fo

Ageware er fyrsta fyritøkan í Føroyum, sum mennir eitt telduspæl, sum ein altjóða útgevari er áhugaður í at geva út á heimsmarknaðin.

Framtíðarútlitini í hesi ætlan eru stór, tá hugsað verður um, at marknaðurin fyri telduspøl er størri enn films- og tónleikamarknaðurin tilsamans.

Fyrsta stigið í verkætlanini verður fíggjað av einum privatum íløgufelagi, sum hevur valt at satsa upp á Ageware.

Ageware er samstundis fyrsta fyritøkan, sum gerst partur av business factory-virkseminum í Íverksetarahúsinum.

Tað gongur í stuttum út uppá, at nýggjar fyritøkur við lovandi hugskotum verða settar á stovn, og at íleggjarar verða knýttir at ætlanini.

**sb.**

## Klaksvík og Sisimiut samstarva um sólorku

Ein nýggja NORA-verkætlan skal menna eina sólorkuskipan, sum kann brúkast undir harðligum veðurlíkindum sum júst hóska til føroysk og grønlendsk viðurskifti.

Henda ætlanin fekk herfyri eina játtan uppá 450.000 krónur frá NORA tað fyrsta árið. Ætlanin er at samstarva við vinnulívið og teknisku skúlarnar í eini ætlanini at byggja eitt stórt anlegg í Klaksvík, sum bæði skal hýsa sólorku og vindmyllum.

Sambært ætlanini verður miðað eftir at hita upp báðar ítróttarhøllirnar og svimjihøllina í Klaksvík. Mett verður, at hetta nýggja anleggið verður ein tøkniligur og umhvørvisvinarligur varði í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara.

Í Sisimiut hava tey longu royndir við sólorkuni. Hesar royndirnar skulu nú eftirmetast og skapa grundarlag fyri einum nýggjum anleggi í eini bygd í nánd av býnum.

Við báðum ætlanunum verður ein samstundis við til økja tilvitanina um burðardyggar orkuloysnir, og tørvin á at minka C02-útlátið í báðum londum.